# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# TEY STINGA HVØR ØÐRUM SKØR

Tá ið løgtingsmenn verða settir at døma landsstýrismenn, eiga vit at hava skálkin bak oyrað, tí tað er sum at seta rev at ansa hønum.

Mikil orðadráttur hevur seinastu dagarnar verið um, hvørt Jacob Vestergaard eigur at fara frá, tí hann hevur goldið fiskimonnum minstuløn í heimildarloysi. Tað var í heyst, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum kom í klemmu millum tvær lógir. Øðrumegin var tað lógin, sum gav fiski- og útróðrarmonnum rættin til inntøkutrygd, og hinumegin var tað figgjarlógin, sum løgtingið hevði samtykt, og har tað ikki var nóg mikið av peningi til at gjalda fiski- og útróðrarmonnum tað, sum teir høvdu rætt til.

Tá slík mál koma fyri, har landsstýrismenn verða lagdir undir at handla í heimildarloysi, so kemur vargur í. Andstøðan – og andstøðufólk í samgonguni (sum er vorðið ein fastur táttur í hesari samgonguni) – hótta við líkum og ólíkum. Landsstýrismálanevndin kom til ta niðurstøðu, at landsstýrismaðurin hevur framt brot á figgjarlógina, játtanarlógina og á stýrisskipanarlógina. Landsstýrismálanevndin er soleiðis samd við løgtingsgrannskoðunum, sum vístu á, at Jacob Vestergaard longu á vári í fjør átti at vitað hetta og átti at biðið um neyðuga eykajáttan ella lagt uppskot fyri tingið um at broyta lógina um inntøkutrygd, so upphæddirnar vórðu lækkaðar.

Vit kunnu helst verða samd í hesum niðurstøðu hjá landsstýrismálanevnd og løgtingsgrannskoðarum. Men tað virkar »hol í høvdið«, sum ein advokatur tekur til í Sosialinum fríggjadagin, at ein landsstýrismaður skal revsast fyri at bróta eina lóg – tá hann er noyddur annaðhvørt at bróta hesa lógina ella hasa lógina.

Tað var undir landsstýrinum hjá Edmundi Joensen, at vit fingu lógina um ábyrgd landsstýrismanna. Tann fyrsti landsstýrismaðurin, sum varð frákoyrdur, var Sámal Petur í Grund, sum Edmund Joensen loysti úr starvi 1. desember í 1997.



Hetta førdi til, Sjálvstýrisflokkurin tók seg úr samgonguni. Tann næsti, sum varð frákoyrdur, var Signar á Brúnni. Hann loystur úr starvi 28. mars í 2000, tí hann hevði útgoldið starvsfólkum í sjónvarpinum løn, hóast eingin játtan var. Hetta málið líkist kanska málinum hjá Vestergaard. Men Signar á Brunni varð reinsaður seinni í eini løgfrøðiligari kanning.

Okkurt er, sum bendir á, at grundarlagið hjá landsstýrisfólk at virka, eigur at verða tillagað, so vit sleppa undan slíkum støðum. Kanska áttu tingfólk at lagt størri arbeiða í hetta, heldur enn at stinga hvør øðrum skør – einans við politiskum vinningi fyri eyga.

**» Løgið at revsa ein sum er noyddur at bróta lógina**




*Myndartekstur: Skúlin er hin sami, men navnið er broytt til Frískúlan við Hoyvíkstjørn*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Adventistaskúlin skiftir navn

Navnabroyting Adventistaskúlin við Hoyvíkstjørn eitur frá í dag av Frískúlin við Hoyvíkstjørn. – Vit vilja fortelja í navninum, hvat hetta er fyri ein skúli, sigur Janne Schantz Johnsson, skúlastjóri.

Síðan hann varð bygdur fyri 43 árum síðani, hevur eyknevnið Adventistaskúlin hingið við, kanska serliga tí at tað tá vóru Nonnuskúlin og Adventistaskúlin. Men nú verður ein navnabroyting framd, og fer skúlin framyvir at kallast Frískúlin við Hoyvíkstjørn.

Janne Schantz Johnsson, skúlastjóri, sigur at tey nú vilja fortelja í navninum, hvat hetta er fyri ein skúli.

– Nú hava vit fingið eina frískúlalóg, og hetta er ein frískúli. Tað eru nógv, sum halda at hetta er ein fólkaskúli, líkasum at Nonnuskúlin er ein fólkaskúli, men tað eru vit ikki. Tað er einki broytt rundanum skúlan, tí tað er enn Adventistakirkjan, sum stendur aftanfyri skúlan, men vit hava bara valt at fáa tað inn í navnið, at hetta er ein frískúli, staðfestir Janne Schantz Johnsson, skúlastjóri.

*rogvi@sosialurin.fo*



**» Nú rýkur illa úr Uttanríkisráðnum**

SJÚRÐUR SKAALE
KJAK Á SÍÐU 12



**» Ring at fáa prestastarv**

FRÍÐLEIF LYDERSEN
KJAK Á SÍÐU 10

# Ríkispolitistjórin á vitjan

Í dag og ímorgin er nýggi Ríkispolitistjórin, Jens Henrik Højbjerg, á vitjan í Føroyum.

Vitjanin er ein liður í arbeiðinum hjá nýggja Ríkispolitistjóranum at seta seg inn í viðurskiftini í ymsu politikredsunum í ríkissambandinum, og nú er tørnið komið til Føroya.

Eg havi longu vitjað í Havn, og nú eru vit á veg inn til Runavíkar og til Klaksvíkar at vitja har, sigur Jens Henrik Højbjerg.

Hann avsannar, at vitjanin hevur nakað við kontroversiellu setanina av nýggjum og donskum politiinspektøri, sum hevur verið uppi og vent, bæði í Løgtinginum og í Fólkatinginum.

Og hóast tíðin hevur verið stutt hjá Ríkispolitistjóranum, so hevr hann longu fingið eina góða fatan av føroyska politinum.

Jens Henrik Højbjerg fer av landinum aftur í morgin.



**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*